## DAGSINS MEINING

# Hóttanir

Flestu okkara geva tí ikki far í gerandisdegnum. Hann rúmar so nógv annað, at ein tann álvarsligasta hóttanin móti mannaættini verður bara gloymd ella tagd burtur. Tað snýr seg um frárensl frá kjarnorkuverkum og handfaringin av kjarnorkuburturkasti.

Hetta er ikki tað vit í vesturheiminum geva mest gætur. Og tað er kanska heldur ikki so løgið. Vit lata nevniliga øðrum trupulleikan. Fyrrverandi Sovjetsamveldið tykist verða framtíðar kjarnorkukøsturin. Russar hava tørv á valuta og hóast móttøku- og goymsluumstøðurnar fyri gomlum kjarnorkuburturkasti eru vánaligar, so tykist gongdin verða tann, at sera vandamikla burturkastið frá kjarnorkuídnaðinum í vesturheiminum verður flutt til Ruslands, har sokallað trygg endurvinningarverk skulu viðgera og goyma tað. Vit vita betur.

Umhvørvisfelagsskapir og stjórnir ávara móti hesi gongd, tí tað er ein sannroynd, at kjarnorkuburturkastið er ikki í nóg tryggum hondum, tá tað verður flutt til Ruslands. Leingi hevur verið tosað um, at kjarnorkuburturkast hevur dálkað vøtn og áir. Men enn hevur henda dálking ikki fingið okkum í vesturheiminum at lata við seg koma. Vit eru nøgd bara vit ikki sjálvi eiga henda trupulleika.

Hetta er tó ikki einasti vandin. Ein onnur hóttan er frárenslið frá verandi kjarnorkuverkum eitt nú tí í Sellafield í Bretlandi. Eitt ótal av kanningum hevur prógvað, at frárenslið dálkar havið og alt livandi har í nánd. Ikki nóg mikið við tí. Eiturevnini fara við streyminum víða um og eru funnin so langt burturi sum við Norðpólin. Hetta hevur fingið stjórnirnar í londunum við Atlantshavið at móttmæla. Men einki tykist at rína við mætu kjarnorkufyritøkurnar ella stjórnirnar, sum hava ábyrgdina í síðsta enda. Bretska stjórnin t.d. hevur ikki verið til at vika.

Spurningurin er tí: hvussu kunnu vit krevja av tilafturskomnum londum sum Ruslandi, ið tørva valuta, at tey skulu fyrihalda seg skilagott mótvegis kjarnorkuvandanum, tá framkomin lond sum eitt nú Bretland leggja sektina á, um teirra egnu kjarnorkuverk dálka!

Kring allan heim fyllast goymslurnar við kjarnorkuburturkasti. Goymt verður undir jørð og á øllum hugsandi plássum, sum við dagsins vitan skulu eitast at vera trygg. Men hvat framtíðin hevur at bjóða verður ikki so nógv hugsað um. Spurningurin er um, vit ikki eru við at lata eina tikkandi bumbu víðari til okkara eftirkomarar! Vit, sum hava fingið náttúruna til láns frá somu eftirkomarum!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR



# Blokkurin!

**Hanna Lisberg**
*Tórshavn 20.8.01*



Tá fíggingin av sosialmálum fór í blokkin, tá fylgdi ein treyt við.

Pensiónirnar skuldu fylgjast upp – so tær vóru verandi sum í DK. Tær høvdu eisini verið prístalsviðgjørdar eftir donskum prístali.

Danskir tænastumenn í Føroyum fáa ájavnt við danir.

Tá nú talan er t.d. um fólkapensión fær ein dani, sum einki annað hevur av inntøku

Giftur: kr. pr. mð 6.264,-
Einligur: kr. pr. mð 8.552,-
Føroyingur
giftur: 4.678,-
Einligur 6.046,-
Í % g. 74,68
– e. 70,7

Er ein føroyingur so lítið verdur í dag, hvussu verður, tá loysingin er rokkin? Vit byrjaðu á sama støði!

Í einum samfelag, har gott er at liva, verður fyrst bøtt um hjá teim veikastu.

So og so nógv børn verða fødd um árið, ja so rokna vit út, hvussu nógvir stovnar, brúk er fyri. Skúlar skulu byggjast – heilsuverkið útbyggjast – stovnar til veik og gomul mugu gerast.

Her hava okkara politikarar sovið í tímanum. So um tað ikki longu er ov seint at fáa teir at vakna, so hava vit veljarar ein part av skuldini.

Sum nú er, hava politikararnir gjørt uppskot um eftirløn til 1 persón í fimti árunum, 2-3 persónar í sekstiárunum o.s.fr. (afturvirkandi).

Hetta er óhugsandi í øllum framkomnum londum, tí tað er frameftir, vit eiga at arbeiða. Frasan sigur: »Øll hava rætt til sømiligar lønir og eftirlønir«.

Taka vit læraralønir, so vóru tær ógvuliga lágar til 1958 (meðan Poul E. Petersen, sáli var form. í Føroya Lærarafelag). Tá kom vend í. Fólkapensiónin var høvuðsmálið til valið í 1958.

Ikki vóru tað mong, sum trúðu uppá hetta. Broytingin var ógvuliga stór.

Síðani vaksa lønir á arbeiðsmarknaðinum, men fólkapensiónin stendur í stað – ímóti tí, sum álagt var smb. løgtingstíðindum – tá blokkurin kom.

Her kann eingin vaska hendur! Tað, sum eg eri mest ill um og hørm um er, at javnaðarflokkurin heldur einki hevur gjørt fyri at rætta hetta mistak.

Aðrir menn vóru í 1958 – mangt hendir á mansins æru. Hevði maður gjørt eitt mistak, skammaðist hann ikki at biðja um umbering – teir mistu ikki andlit! Nei. Í dag eru tað fyrst og fremst sínar egnu lønir og eftirlønir. Teir hava sæð, at tað er skeivt, men umbering? Nei. Teir hava mist andlit í dag.

Tær nevndir – vildigar ella óvildigar – geva tykkum ikki andlit aftur. Álitismissur er torførur at byggja uppaftur.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# Hoyvíkin næststørsti býur í Føroyum eftir komandi útstykkingar!

Tíðindaskriv:

**Heðin Mortensen**
*Formaður í Byggi- og býrskipanarnevndini*



Farið verður nú undir fyrsta byggistig av fýra í Hoyvíkshaganum. Umsóknarbløð eru send umsøkjarum á bíðilista. Tá øll fýra byggistigini eru framd koma at búgva útivið 6000 fólk í Hoyvíkini.

Lendisviðurskiftini í Havnini eru soleiðis háttað, at her ber til at vaksa um býin nøkur ár fram niðanfyri ta hædd, ið hildin verður egnað, tá talan er um hitaviðurskifti, gróð-ur, vindviðurskifti v.m. Hesi enn ikki endaliga útstykkjaðu økini eru í Hoyvíkshaganum og í Marknagili. Men um bygt verður traditionelt á hesum økjum, so eru tey ikki størri enn so, enn vit tosa um eini 6-700 grundstykki.

Royndir eru áður gjørdar við alternativum byggihátti, t.d. í Tórsbyrgi, á Berjabrekku, Millum Gilja og Inni á Gøtu. Hesar loysnir hava verið væl móttiknar og lutvíst eisini væl eydnaðar, tóat kostnaðurin fyri hesar royndir hevur verið ov høgur fyri keyparan. Men byggjast kann víðari á hesar royndir og vit kunnu betra um byggihættirnar, um-framt at gera tilboðini meira fjølbroytt.

Royndirnar, sum privatfyritøkur hava gjørt við t.d. at byggja raðhús, hava meira ella minni víst politikkarunum vegin, soleiðis, at víðari útbyggingin av eitt nú Berja-brekku fer fram á privatum grundarlagi. Áræðið hjá hesum entreprenørum hevur eisini verið við til at leggja eina heilt nýggjan hugsan sum støði undir nýggju útstykkingini í Hoyvíkshaganum, ein ætlan, sum nú fer av bakkastokki.

### Nýggjur byggisiður

Hvat bæði byggisiði og — søgu viðvíkur, so verður Hoyvíkshagin Suður nakað heilt nýtt. Í fyrsta lagi kunnu fólk fáa møguleika at ogna sær smærri grundstykki, har loyvt er lutfalsliga at byggja meira á enn vanligt, bygt verður tættari enn áður, og bygd verða bæði samanbygd hús, og lonir, ið ætlandi skulu seljast lyklaklár. Og hetta er bert fyrsta byggistigið, har byrjanin til eina handilsgøtu eisini verður løgd.

Fyri at gera útstykkingina so fjøltáttaða sum gjørligt er ætlanin at integrera økið við eldrasambýli, dagstovni, skúla og øðrum tænastum. Í ætlanini er eisini rúm fyri íbúð-um til lesandi, til rørslutarnaði og til fólk við minni peningaligum rásarúmi. Tað er eitt nú álagt teimum, ið byggja, at allar íbúðir í vegahædd skulu verða innrættaðar soleiðis at øll, eisini rørslutarnað, skulu kunnu gera nýtslu av teimum. Dalurin Langi er harnæst lagdur til fríøki, harvið fæst ein »grønur kíli« niðan gjøgnum býarpartin.

### Næststørsti býur í Føroyum

Tá Hoyvíkshagin er fult útbygdur innanfyri komandi ytra ringvegin, so er Hoyvíkin næststørsti »býur« í Føroyum við útivið 6000 íbúgvum. Fyrsta stigið fer av bakka-stokki nú og hildið verður fram við teimum næstu trimum beinanvegin. Nevnast kann, at í 4. byggistigi hevur kommunan samtykt at byggja lonir við íbúðum, sum vit kenna tær úr grannalondunum.

Fyrsta byggistigið er byrjanin til ein miðbý fyri Hoyvíksøkið. Í hesum partinum er øki lagt av við sambindingarvegin til handlar, hetta verður sum frálíður ovasti partur av nýggjum býar- og handilsvegi, ið ætlandi verður lagdur oman gjøgnum 2. og 3. byggistig fyri at enda í einum torgi niðri við Hoyvíkar Skúla, har nýggj kirkja ætlandi verður bygd.

Í hesum fyrsta stiginum verða nú lutað út til umsøkjarar á bíðilista 45 samanbygd hús, 31 grundstykki á 5oo fermetrar, 45 á 400 fermetrar og 54 grundstykki á 300 fer-metrar. Tilsamans 175 grunstykki í fyrsta byggistigi. Í hesum økinum er harafturat løgd øki av til skúla, dagsstovn, handlar, eldrasambýli og frílendi.

Í fyrsta parti av býarpartinum Hoyvíkshagin Suður verður eigarafelag stovnað. Allir eigarar av grundstykkjum í útstykkingini skulu vera limir í eigarafelagnum. Øllum í økinum verður álagt at nýta fjarhita frá Fjarhitafelagnum.

Fundur verður fyri umsøkjararnar í sambandi við, at grundstykkini nú verða lutað út, har kunnað verður um ætlanina. Tá øll stykkini eru lutað út verður eigarafelag sett á stovn fyri at fremja ætlanina, herundir at bjóða arbeiðið út, hava eftirlit við arbeiðnum og at hava fíggjarligu ábyrgdina.

Innan 2 ár frá tí degi, at skeytið er undirskrivað, skal verða bygt á grunstykkinum. Kostnaðurin verður ásettur av eigarafeløgunum, tá arbeiðið er boðið út og tikið er av tilboði, nevnast kann tó, at kostnaðurin fyri seinastu kommunalu útstykkingarnar hevur verið upp í 573,- kr fermeturin.

Faldari við øllum upplýsingum og umsóknarblaði eru sendir umsøkjarum.




Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg


